# Stríðið um upplýsingar skal standa sína roynd

**Peningastovnarnir bardust hósdagin fyri sínum rætti til at flyta edv-skipanir av landinum, tá Rættarnevndin viðgjørdi uppskotið um persónsupplýsingar, sum er lagt fyri tingið**

UPPLÝSINGAR
*Ingi Rasmussen*

Tað leikaði hart á millum Høgna Hoydal landsstýrismann og føroyska peningaheimin, tá landsstýrismaðurin ætlaði at steðga nýggju Gjaldskipanini hjá peningastovnunum við kunngerð.

Gjaldskipanin, sum er ein føroysk útgáva av donsku Betalings Service hjá PBS, hevði við sær, at persónsupplýsingar vórðu fluttar av landinum, segði Høgni Hoydal, og tað var ikki í samsvari við tingsins vilja.

Hetta fekk peningastovnarnar og Elektron við Jørn Astrup Hansen á odda at leggja harðliga eftir landsstýrismanninum, eitt nú við heilsíðulýsingum í bløðunum.

Høgni Hoydal støð við sítt og royndi seg við einari kunngerð, sum hann sendi viðkomandi pørtum til hoyringar. Men mótstøðan var so stór, at hann slepti ætlanini.

Í staðin roynir hann seg nú við einum lógaruppskoti. Tað er ikki so víðgongt, sum kunngerðin var, men meiningin er tann sama. Peningastovnarnir og Elektron mugu gjarna samskifta við útlendskar stovnar, sigur hann, men heilar edv-skipanir mugu ikki sendast av landinum.

Peningastovnarnir eru líka harðliga ímóti, og tað kom fram á fundi í Rættarnevndini hjá løgtinginum, sum viðgjørdi málið hósdagin. Peningastovnarnir hava sjálvir biðið um at sleppa á fund at føra sína sjónarmið fram, áðrenn politikarar taka støðu. Elektron, KT-felagið, Dátueftirlitið og landsstýrismaðurin við lógarmálum vórðu eisini tráspurd.

Høgni Hoydal sigur seg bert gera eftir tingsins vilja. Men samstundis er ivasamt, um hann hevur løgtingið aftan fyri seg. Tað fer tíðin at vísa.



*Politikarar øðrumegin og bankastjórar hinumegin fundaðust í gjár um lógina, sum skal forða persónsupplýsingum at verða fluttir av landinum.*

*Mynd: Jens K. Vang*



*Danska ríkið skal verjast. Hetta snýr seg um trygdina hjá danska ríkinum. Tað er møguligt, at danir vilja skera út í papp og gera púra greitt, at á hesum øki verða føroysk ynski ikki gingin á møti, sigur Bjørn á Heygum, advokatur*

# Moralskt skeivt – juridiskt í lagi

**Vit eiga ikki at góðtaka, at danska stjórnin setir eina hernaðarlóg gildi fyri Føroyar ímóti løgtingsins vilja. Tað heldur Bjørn á Heygum advokatur. Men føroyingar kunnu ikki gera tað stóra, um danska stjórnin hevur tikið avgerð. Tí talan er um eitt málsøki, sum hevur við sjálvan suverenitetin at gera**

HERNAÐARLÓG
*Ingi Rasmussen*

Formliga er tað í lagi. Moralskt og fólkarættiliga er tað als ikki í lagi.

Tað er skjóta niðurstøðan hjá Bjørn á Heygum, advokati, um málið, sum Sosialurin bar fram í gjár, har danska stjórnin setir eina lóg í gildi fyri Føroyar ímóti løgtingsins vilja.

Løgtingið hevur samtykt, at gamla hernaðarliga revsilógin frá 1937 skal strikast og ongin setast í staðin. Danska stjórnin hevur svarað aftur við at lýsa nýggju donsku hernaðarligu revsi- og rættargangslógina frá 1973.

Tað hevur skelkað landsstýrismannin við lógarmálum, Høgna Hoydal, sum ætlar at gera alt fyri at steðga málinum. Bjørn á Heygum, sum var ein av løgfrøðingunum, ið gjørdu stýrisskipanarlógina, heldur ikki, at føroyingar fáa gjørt stórvegis.

– Tú ert noyddur at skilja hetta sundur. Frá einum føroyskum sjónarmiði er tað ikki lagi, moralskt sæð, at stjórnin setir lógir í gildi ímóti okkara vilja. Men um vit halda okkum strangt til løgfrøðina, er tað púrasta í lagi. Tí hatta er eitt danskt málsøki burturav. Vit kunnu bara ummæla og geva okkara meining til kennar, men tað merkir ikki, at løggávan sær út, sum vit vilja, sigur Bjørn á Heygum.

### Tørvur á broytingum

Bjørn á Heygum heldur seg bara minnast einaferð áður, at ein lóg er sett í gildi, uttan at løgtingið er spurt eftir. Tað var í sambandi við bankamálið.

– Vit eiga ikki at góðtaka tað, men soleiðis sum skipanin er í løtuni, kunnu vit ikki forða fyri tí. Hvat kunnu vit gera? Hetta vísir bara, at tørvur er á at gera í minsta lagi nakrar dagføringar, sum hava ásetingar um, at ongin lóg kann setast í gildi í Føroyum, uttan at løgtingið hevur givið sítt tilmæli. Óansæð, um talan er um danskt málsøki, sigur Bjørn á Heygum.

Løgtingið skuldi altso havt ein veto-rætt. Ongin lóg skuldi sloppið ígjøgnum nálareygað, uttan eitt samtykki frá fólkavalda tinginum í Føroyum. Men spurningurin er, hvussu veruligt tað er í málum, har danir hava fullan myndugleika.

### Her gongur markið

Hernaðaliga revsilógin, sum talan er um, hoyrir undir verjumál. Tey eru knýtt at fullveldinum og ræðinum yvir Føroyum. Tí kann hugsast, at hetta málið hevur fingið serliga viðgerð í Danmark.

– Hernaðarmál- og verjumál hava nakað við suverenitetin at gera. Her gongur markið. Her ráða danir. Hetta snýr seg um trygdina og verjuna av danska ríkinum. Tað er møguligt, at danska stjórnin vil skera út í papp og gera púra greitt, at á hesum øki verða føroysk ynski ikki gingin á møti, sum í øðrum málum, sigur Bjørn á Heygum.



# Ríkisumboðið verjir borg

**Tað má bara vera í heilt serligum førum, at danskir myndugleikar seta ríkislógir í gildi ímóti løgtingsins vilja. Hernaðarliga revsilógin er eitt serligt føri, tí hon má vera eins fyri alt ríkið, sigur Birgit Kleis, sum vegna donsku stjórnina hevur lýst eina lóg í Føroyum, sum føroyingar ikki vilja kennast við**

HERNAÐARLÓG
*Ingi Rasmussen*

Danska stjórnin setir beint ímóti løgtingsins vilja donsku hernaðarlógina frá 1973 í gildi í Føroyum. Løgtingið hevur annars samtykt, at vit als onga hernaðarlóg skulu hava í Føroyum.

Í Føroyum umboðar Birgit Kleis, ríkisumboð, donsku stjórnina. Og hóast hon onga ávirkan hevur havt á avgerðina at lýsa eina ríkislóg fyri Føroyar, so má hon verja avgerðina. Tí danska ynskið er lóg.

– Frá danskari síðu er ynskið, at tey hernaðarfólkini, sum eru í Mjørkadali, hava somu reglur at ganga eftir, sum tá tey eru í Danmark. Tað ber ikki til, at tað eru nøkur støð í danska kongaríkinum, at hernaðarligir persónar hava aðrar reglur at ganga eftir enn aðra staðni. So endamálið við at lýsa hernaðarligu revsi- og rættargangslógina fyri Føroyar er, at talan er um eina løggávu, sum má vera eins fyri alt ríkið, sigur Birgit Kleis.

Tað er hon biðin um at syrgja fyri. Og tað førir hon út í lívið, tí hon hevur longu sent lógirnar til kunngerðar hjá Kunngerðarblaðnum B, sum kemur út í næstum. Eina viku eftir, at blaðið er komið út, kemur lógin í gildi í Føroyum.

### Eitt undantak

Løgtingið samtykti annars, at gamla lógin frá 1937, sum eitt nú loyvir deyðarevsing í kríggstíð, skuldi takast av, og ongin lóg setast í staðin. Tað var hildið at vera óneyðugt við hernaðarlóg í Føroyum.

Sostatt lýsa donsku myndugleikarnir eina ríkislóg beint ímóti einari løgtingssamtykt, og tað halda løgfrøðingar vera fyrstu ferð, síðan heimastýrislógin kom í gildi. Enntá uttan at spyrja løggevandi valdið í Føroyum eftir. Spurningurin er, um hetta er serliga demokratiskt.

– Hetta er ikki høvuðsreglan, men avgjørt undantakið. Tað má absolutt bara henda í heilt serligum førum. Tað er eisini vert at geva gætur, at hetta er ein lóg, sum bert er galdandi fyri hernaðarfólk í Føroyum – ikki føroyska fólkið. Og hon er sett í verk við tí grundgeving, at tað í serligum førum má vera sama lóg galdandi fyri alt ríkið. Og verjan av ríkinum er eitt serligt føri, sigur Birgit Kleis.

Føroyar hava klárað seg uttan lógina í 30 ár. Og føroyska støðan er, at vit eisini høvdu klárað okkum uttan, tí viðurskiftini hjá hervaldinum kundu verið skipað eftir vanligum revsirættarligum reglum og serligum sáttmálum.

– Tað dugi eg ikki at svara uppá. Eg kann bara siga, at verjumálaráðið hevur ynskt hetta soleiðis, og tey hava lagt stóran dent á, at hetta verður fingið í rættlag. Men eg veit ikki, hvørjar avleiðingar tað hevði fingið, um vit hildu fram uttan eina dagførda lóg, sigur Birgit Kleis.

### Danskur boðberi

Ríkisumboðið er sostatt bert eitt víðkað postkontór, sum fylgir og ber boðini víðari, sum hon hevur fingið frá danska forsætismálaráðnum.

– Tað má eg viðganga. Mín ávirkan er ikki stór í hesum føri. Eg havi ikki verið ein partur av avgerðini, men eg havi noterað mær, at hetta er ikki væl sæð í løgtinginum, og tí havi eg eisini borið føroysku sjónarmiðini víðari til forsætismálaráðið. Føroysku sjónarmiðini eru kend í Danmark í hesum máli, sigur Birgit Kleis.



*Í serligum førum má sama lóg vera galdandi fyri alt ríkið. Eisini sjálvt um føroyingar ikki ynskja tað, sigur Birgit Kleis, ríkisumboð*

*Mynd: Jens K. Vang*